


# SMYRIL LINE SØKIR LEIÐARA TIL SØLUDEILDINA Í FØROYUM

Leiðarin av søludeildini í Føroyum hevur fingið aðrar avbjóðingar í Smyril Line, og tí søkja vit eftir nýggjum leiðara til søludeildina í Føroyum.

Vit bjóða tær eitt spennandi, avbjóðandi og sera fjølbroytt starv, har tú fært møguleika at verða við í framhaldandi menningini av Smyril Line – og harvið føroysku ferðavinnuni.

Sum leiðari fyri søludeildini í Føroyum hevur tú ábyrgdina av allari søluni og marknaðarføringini hjá Smyril Line á føroyska marknaðinum. Hartil hevur tú ábyrgdina av starvsfólkunum á søludeildini.

Starvið inniber í høvuðsheitum:

- at tryggja at sølubudgett verða nádd,
- at ganga á odda í menning av produktum til føroyska marknaðin,
- ábyrd av framhaldandi menning av søludeildini og teimum 8 starvsfólkunum, ið har arbeiða.

Vit bjóða góðar starvstreytir og góðar møguleikar fyri menning í einum altjóða fyritøku, góða løn og góðar frítíðarsømdir.

**Førleikakrøv**
Starvið er eitt lyklastarv í Smyril Line. Til tíðir hart, men altíð spennandi og avbjóðandi. Tí søknast vit eftir einum royndum søluleiðara, helst við útbúgving frá hægri lærustovni. Hetta kann verða cand.merc., cand.ling.merc. ella HD. Hægri útbúgving er einki krav, men tað er eitt krav, at tú hevur royndir við sølu og leiðslu, at tú megnar at dríva eina søluorganisatión og, at tú brennur fyri sølu og søluarbeiði.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum og ummælum skulu sendast til:

**SMYRIL LINE**
Sølu- og marknaðarstjórin
P.O.Box 370
FO-110 Tórshavn

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 30. august 2007 kl. 17.00.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til sølu- og marknaðarstjóran, Jákup Sverra Kass, á +298 21 59 36 ella jsk@smyril-line.fo

Smyril Line varð stovnað í 1982, og er í dag ein altjóða fyritøka við skrivstovum í Føroyum, Íslandi, Noreg, Týsklandi og Danmark. Umframt egnar skrivstovur, hevur felagið eisini aðalsøluumboð í Fraklandi, Stórabretlandi, Hollandi, Italien, Belgien og Svøríki.

**SMYRIL LINE** · J. BRONCKS GØTA 37 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN
TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.COM



# SKALLERUP KLIT Í SEPTEMBUR







Njótið frálíka danska seinsummarið í Skallerup Klit – har er alt sum hjartað tráar eftir. Farið við børnunum til baðilandið Atlantis. Har eru fleiri hyljar, ein 83 metra langur vatnrussjubani, vatnkanónir, holur og pálmar. Til tey vaksnu hava tey tað stóra romverska baðilandið Romulus. Gjørt sum baðini í gamla Rom. Farið í urta- ella dampbað, royni massasju av alkyns slag, leir ella alguinnballing og aromarøkt. Tit kunnu eisini fara í djóragarðin við dádýrunum, páfuglunum og geitunum. Pony-hestar eru til børnini. Harumframt skipað starvsfólkini fyri skattajagt, t-shirt-máling og øðrum ítrivum. Okkara uppskot: Mamma hevur uppiborið nakrar tímar í Romulus – pápi og børnini fara ein túr í baðilandið og í djóragarðin.

## PRÍSUR FYRI HVØNN FRAM OG AFTUR ÚR BERT KR. 1.882,-

Prísurin er galdandi í grønum tíðarskeiði fyri 4 ferðandi og 1 bil (maks. 1,9 m høgur, 5 m langur og 2 m beiður) á leiðini Tórshavn - Hanstholm og aftur. Umborð verður búð í 4-koyggju kamari u/vindeyga. Í Skallerup verður búð í standard íbúð (íbúð A4) í 7 nætur. Ikki íroknað er orkugjald á frítíðardeplinum sum er DKK 9,00/hús/nátt umframt DKK 2,25/kWh. Tilboðið galdandi við fráferð tann 13. og 20. septembur.

SMYRIL LINE · J. BRONCKSGØTA 37 · POSTSMOGA 370 · FO-110 TÓRSHAVN · TEL +298 34 59 00 · FAX +298 34 59 50 · BOOKING@SMYRIL-LINE.FO

DANMARK · NOREG
SKOTLAND · HETLAND
ÍSLAND · CRUISE

WWW.SMYRIL-LINE.FO